# Kanna nýggjar hotelmøguleikar

**Stjórarnir á Hotel Hafnia og Flogfelag Føroya arbeiða við møguleikanum at leiga hotelskip at hava liggjandi í Føroyum um summarið**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

Væntandi vaksandi virksemi í landinum hevur fingið Johan Restorff, stjóra á Hotel Hafnia, og Una Danielsen, stjóra á Flogfelag Føroya, at fara at kanna møguleikan fyri at fáa eitt hotelskip til Føroya fyri at loysa tann ringasta gistingartørvin um summarið.

Talan er ikki um Hotel Hafnia og Flogfelag Føroya sum so, men um persónarnar Johan Restorff og Una Danielsen, sum hava tosað saman um hesa ætlanina, leggur Johan Restorff dent á.

Johna Restorff sigur við Sosialin, at enn er eingin avgerð tikin um nakað ávíst skip, men arbeitt verður miðvíst við málinum. Hann sigur samstundis, at tað verður ikki í summar, at nakað skip kemur. Til tess er ov nógv liðið á árið, uttan at nøkur marknaðarføring er gjørd.

Tað er væl eingin loyna, sigur Johan Restorff, at ein komandi oljuvinna liggur í bakhøvdinum, tá farið verður undir slíkt tiltak. Og hon fer kanska eisini at gera av, hvar eitt slíkt skip verður lagt, sigur hann.

Sjálvandi er nærliggjandi at hugsa, at eitt møguligt hotelskip fer at liggja í Havn, tí har koma flestu ferðafólkini hóast alt einaferð á eini ferð til Føroya. Men verður til dømis ein útgerðarhavn løgd onkra aðrastðani, er kanska meira brúk fyri gistingarmøguleikum har.

Eitt skip hevur, sum vitiligt er, ikki heilt teir somu møguleikarnar, sum eitt veruligt hotel hevur. Tí høvdu verið ávísir fyrimunir við at lagt tað har, hotellini eru frammanundan, soleiðis at gestirnir kundu brúkt ymsu tilboðini, sum hotellini hava fram um eitt skip.

Annars sigur Johan Restorff, stjóri á Hotel Hafnia, at Hotel Hafnia sjálvt arbeiðir miðvíst við ætlanum um at víðka virksemið.

Ásannandi at neyðugt er at vera undan menningini í samfelagnum annars, hevur hotellið umsókn liggjandi hjá Tórshavnar Býrað um øki at byggja nýtt á. Tað er bara ein neyðug gongd, sum tó einki ítøkiligt er komið upp á enn, annað enn at umsókn um stykki er latin, sigur Johan Restorff, stjóri á Hotel Hafnia í Havn.


*Jóhan Restorff, her avmyndaður saman við soninum Martini, arbeiðir við alternativum hotellmøguleikum*

*Mynd: Jens K. Vang*

# Norðstreymoyingar keypa skip

**Nakrir mans úr Norðurstreymoy eru í hesum døgum í Íslandi og keypa skip. Talan er um ein rækjutrolara av Akureyri**

SKIPAKEYP
*Edvard Joensen*

Ein rækjutrolari aftrat er á veg í føroyska flotan. Talan er um ein 12 ára gamlan kombineraðan rækju- og flakatrolara.

Tað er rættiliga ringt at fá nakað nágreiniligt at vita um hetta skipakeypið. Sosialurin hevur havt orð á onkran av monnunum, sum eru í Íslandi í løtuni. Men teir hava bara ta viðmerking, at teir hava onga viðmerking.

Tó frættist aðrar vegir, at talan er um eitt skip, sum eitt íslendskt reiðarí hevur havt skrásett í einum av Baltalondunum, sum nú er keypt til Føroya fyri einar 65 milliónir krónur. Skipið lastar umleið hálvtsjeyndahundrað tons og hevur góða frystiorku.

Menninir aftan fyri hetta skipakeypið hava lagt rættiliga nógvan eginpenging á borðið, fréttir Sosialurin, og tað er bara føroyskur kapitalur uppií. Øll fíggingin er eisini fingin til vega í Føroyum.

Skipið skal brúkast til rækjufiskiskap í Barentshavinum. Við Svalbard og í russiskum sjógvi, fréttir Sosialurin.

Tað er soleiðis, at føroyingar eiga ávíst tal av fiskidøgum á hesum leiðum, sum ikki verða brúktir. Fiskimálastýrið hevur tí boðað frá, at um onkur er, sum er áhugaður í at royna hesar møguleikar, kann fyribilsloyvi fáa í eitt ár í senn. Treytin er so, at um onkur við permanentum loyvi so kemur og vil sleppa at fiska, fær hann forrætt.

Tað komu 31 umsóknir til hesi fyribilsloyvini, sigur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður við fiskivinnumálum. Og Fiskimálastýrið gjørdi bart og gav øllum 31 umsøkjarunum hvør sína tilsøgn um fyribilsloyvi til rækjufiskiskap í Barentshavinum í eitt ár.

Tað er so eina av hesum tilsøgnunum, skipið, sum nú verður keypt úr Íslandi, skal brúkast til, váttar Jørgen Niclasen, landsstýrismaður við fiskivinnumálum.

Hann sigur samstundis, at Fiskimálastýrið veit einki um, at nakað innflutningsloyvi er givið til nakað skip, sum keypt er úr Íslandi.





# Hava stovnað nýtt ættargranskingarfelag

ÆTTARGRANSKING
*Tíðindaskriv*

Hóskvøldið í síðstu viku varð nýtt ættargranskingarfelag sett á stovn.

Felagið hevur fingið altjóða navnið Genealogi.fo, men ætlanin er eisini at finna eitt gott føroyskt navn til felagið.

Endamál felagsins er at skapa eitt forum fyri telduviðgerð í ættargransking við tiltøkum sum at skipa fyri fyrilestrum, fundum og øðrum upplýsandi tiltøkum, at virka fyri at ættargranskingarkeldur verða teldutøkar, at samarbeiða við aðrar ættargranskingarfelagsskapir heima og úti, at kunna um kunningartøkni innan ættargransking og at hava altjóða samstarv við aðrar felagsskapir við sama endamáli.

Eitt tað fyrsta felagið fer at gera, er at stovna eina heimasíðu fyri ættargranskingar. Hendan heimasíðan fer at hava heitið: www.genealogi.fo. Á hesari heimasíðuni verður ymiskt alment tilfar um ættargransking og telduforrit til slíkt. Eisini verður á heimasíðuni møguleiki at leita fram ymiskar upplýsingar, ið ættargranskarar leggja á síðuna. Hesin parturin av heimasíðuni verður ikki almennur, men limirnir fáa eitt loyniorð, ið skal nýtast fyri at koma inn til hesar upplýsingarnar.

Eisini fer felagið at gera kirkjubøkur, fólkateljingar o.t. teldutøkt. Ætlanin er at gera hendan partin í samstarvi við líknandi feløg í grannalondunum, sum hava gjørt serlig telduforrit til slíkar ættargranskingarkeldur.

Á stovnandi fundinum varð nevnd vald, og hon hevur skipað seg soleiðis: Göran Wennerström (gw@post.olivant.fo), formaður, Hans Suni Jensen (hsj@softhome.net), næstformaður, Randi Á. Jakobsen (raj@post.olivant.fo), skrivari, Sofus Johannesen (sofusj@post.olivant.fo), kassameistari og Steinbjørn í Dali (st_dali@post.olivant.fo), internet-ábyrgdari. Eykalimir eru Poul Jákup Thomsen og Peter Kehlet.

Limagjaldið er 100 kr. um árið, og áhugaði kunnu gerast limir við at venda sær til ein av nevndarlimunum.


*Fyrsta nevndin í Genealogi.fo. Frá vinstru: Steinbjørn í Dali, Randi Á Jakobsen, Hans Suni Jensen, Göran Wennerström og Sofus Johannesen*

# Argentiskur Tango í Havn

DANSIVENJING
*Tíðindaskriv*

Tangobólkurin í Havn skipar í vikuskiftinum 9.-11. februar fyri enn einum skeiði í Argentinskum Tango.

Hesaferð eru instruktørarnir eitt nýtt par, sum ikki hava verið í Føroyum áður, Bente og Bo Paulsen. Tey koma bæði frá Tangoakademinum í Århus, og vitjanin er eitt framhald av tí samstarvi, sum higartil hevur verið við hetta dansistaðið.

Bente og Bo Paulsen eru bæði 50 ár, og hava fingið frálæru, bæði frá donskum og øðrum instruktørum, m. a. Gustavo Naviera, Daniela Arcuri, Armando Orzuza og Cacho Dante. Harumframt eru tey við í tangotiltøkum og workshops í Danmark og aðrastaðni í Europa. Afturat tango undirvísa tey eisini í tangovalsi og serliga milonga. Í argentinskum tango verða innan fyri grundstigini dansað ymisk háttaløg. Bente og Bo nýta ein smidligan stíl við íblástri bæði frá tí tætta og tí opna dansistílinum.

Tangobólkurin hittist annars annaðhvørt sunnukvøld kl 20-22. Kaggin hevur verið so beinasamur at læna okkum teirra dansigólv, og næstu dansikvøldini aftaná skeiðið verður sunnudagin 25. februar og 11. mars. Hesi kvøldini royna tey at halda tangolæruna viðlíka. Forvitin eru vælkomin at koma inn á gólvið, og kanska royna seg saman teimum, siga føroysku tangofyrireikararnir.

Ætlanin er at enda dansiveturin við enn einum skeiði 16.-18. mars.



Beinleiðis úr Føroyum til gullstrondina í Spania
14 dagar undir sólini
...úr Føroyum 30. juni og 14. juli

Costa Dorada
3. árið á rað skipar Flogfelag Føroya fyri ferð til gullstrondina í Spania, Costa Dorada. Flogið verður beinleiðis úr Føroyum 30. juni og 14. juli.
Gist verður í kenda feriubýnum Salou, ið liggur við stóru Costa Dorada strondina. Beint við liggur tað størsta stuttleikastaðið, Port Aventura, umframt tað stóra "Vatnlandið". Eisini verður skipað fyri útferðum.
Møguleiki er at velja ímillum fleiri ymisk hotel ella íbúðir.
Ring ella støkk inn á gólvið og fá meira at vita um hendan frálíka møguleikan.

PRÍSDØMI: Hotel Michelangelo ***, 2 fólk... 1/2 pens. 9.680,- pr. pers.
PRÍSDØMI: Hotel Europa ***, 2 fólk.. 1/2 pens. 9.350,- pr. pers.
PRÍSDØMI: Íbúð Maeva, La Font ella Grekus 4 fólk..... 7.200,- pr. pers.
PRÍSDØMI: Hotel Estival Park ****, 2 fólk...... 1/2 pens. 10.450,- pr. pers.
Í øllum prísum er íroknað: Flogferð, ferðaavgjøld og innivist

FLOGFELAG FØROYA
Áarvegur 6 • Postboks 3225 • FO-110 Tórshavn
Tel 34 00 00 • Fax 34 00 11 • e-mail: travel@ff.fo
petur & petur • 320870